UTTAN ÚR HEIMI

# 2005 rættiligt ódnarár



*Fylgisveinamynd av "Katrinu", áðrenn hon bar við amerikonsku strondina*

*Mynd: Reuters*

**Katrina er bara ein av fleiri tropiskum ódnum í Atlantshavinum og Karibiska Havinum í ár, og árið er tað ringasta nakrantíð**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

2005 hevur longu sett fleiri met, tá tað snýr seg um ódnir og stormar í Atlantshavinum og Karibiska Havinum.

"Dennis", sum herjaði Karibiska Havið tíðliga í juli, var tann fjórði tropiski stormurin í ár, og ongantíð fyrr hava so nógvir tropiskir stormar verið har so tíðliga á árinum fyrr. "Franklin", sum herjaði Bahamaoyggjarnar tann 21. juli, var tann sætti stormurin í røðini í summar, og tað var eisini met. "Irena" gjørdi um seg í august sum tann níggjundi í røðini, og so nógvir hava teir tropisku stormarnir ikki verið so tíðliga á árinum fyrr.

Hesaferð er tað ódnin "Katrina", sum ger um seg við Meksikanska Flógvan, men sambært amerikonskum veðurmonnum er ódnartíðin minni enn so av enn. Teir vænta 22 tropiskar stormar í Atlantshavinum og Karibiska Havinum í ár, og fáa teir rætt, er tað met, tí tað gamla metið er 21. Tað var í 1933.

### Oyðandi

"Katrina" fór í land á amerikonsku suðurstrondini seinnapartin í gjár, og myndugleikarnir bóru ótta fyri stórum oyðileggingum. Millum annað var vandi fyri, at ódnin kundi elva til eina seks metrar høga flóðaldu, sum kundi leggja tað lága lendið við býin New Orleans undir í sjógvi.

Amerikonsku veðurmenninir søgdu í gjár, at "Katrina" kann gera líka stóran skaða sum tær kendu ódnirnar "Gilbert", "Mitch" og "Hugo". "Gilbert", sum var í 1988, verður vanliga roknað sum tann harðasta ódnin nakrantíð, tí tá hon rakti Meksiko, Jamaica og Haiti, var vindferðin 80 metrar um sekundið í meðal.

Tann ódnin, sum hevur kravt flest mannalív, rakti Antillurnar í 1780, har meiri enn 20.000 fólk doyðu. Tann største materiella skaðan gjørdi "Andrew", sum herjaði Florida í 1992, og sum gjørdi skaða fyri 27 milliardir dollarar.

# Schröder stendur fyri falli

**Alt bendir á, at Týskland fær eina kvinnu í kanslaraembætið í næsta mánað**

TÝSKLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eftir at hava sitið við valdið í sjey ár bendir alt á, at Gerhard Schröder noyðist at fara úr kanslarastólinum um tríggjar vikur.

Tann seinasta veljarakanningin vísir, at teir borgarligu flokkarnir fara at vinna greiðan sigur á stjórnarsamgonguni. Eftir kanningini fáa Kristiligu Demokratarnir og Kristiliga Sosiala Samgongan í Bayern 43 prosent av atkvøðunum, meðan stuðulsflokkurin, Fríu Demokratarnir, fáa átta prosent. Á hinum vonginum fáa Sosialdemokratarnir 30 prosent og Tey Grønu átta prosent.

Týska valstríðið er sera hart, og í síðstu viku gjørdist tað ov hart fyri sosialdemokratiska floksformannin, Franz Muntefering, sum small á einum veljarafundi í Saarland. Men eftir at hava hvílt seg í eitt samdøgur legði hann aftur til brots í einum sjónvarpskjaki.

Gerhard Schröder, kanslari, heldur eisini á, men eygleiðarar siga, at møguleikar hansara eru smáir. Veljararnir revsa hann, tí hann hevur ikki megnað at loysa trupulleikarnar við tí metstóra arbeiðsloysinum, og búskapurin liggur í andaleypi.

Tey borgarligu lova at bøta um støðuna. Millum annað skjóta tey upp, at allir týskarar skulu hava sama skattaprosent, og at allir frádráttir skulu burtur. Í hvussu er tykjast veljararnir hava størri álit á teimum enn á samgongustjórnini, og tí er sannlíkt, at næsti týski kanslarin fer at eita Angela Mærkel. Tað verður so fyrstu ferð, at ein kvinna situr í týska kanslaraembætinum.

## Sonur Sharon skuldsettur

Ísraelska ákæruvaldið hevur skuldsett Omri Sharon, sum er elsti sonur Ariel Sharon, forsætisráðharra, fyri svik.

Omri Sharon stóð á odda fyri valstríðnum hjá pápanum í 1999, og tað eydnaðist so væl, at pápin bleiv bæði formaður í Likud-flokkinum og forsætisráðharri. Ákæruvaldið sigur, at Omri Sharon fekk umleið sjey milliónir krónur frá stuðlum í Ísrael og uttanlands, sum hann gav Likud-flokkinum, men at hann fjaldi pengarnar fyri myndugleikunum. Tí er hann nú ákærdur fyri svik og fyri at hava brotið ta greinina í vallógini, sum sigur, hvussu nógvan pening ein flokkur kann fáa í stuðuli.

Omri Sharon, sum er limur í tjóðartinginum Knesset, hevur sagt sítt politiska órin frá sær, so hann kann koma fyri rættin. Ein vinmaður hansara er eisini skuldsettur í málinum.

Hetta er ikkii tann fyrsta gølan í forsætisráðharratíðini hjá Ariel Sharon. Løgreglan hevur fyrr kannað, hvussu og hvaðani hann hevur fingið pengar til valstríð, og ivi hevur eisini verið um, hvussu hann hevur útvega sær ymsar ognir. Men higartil er hann sloppin undan skuldsetingum.

## Arnold illa sperdur

Fyri einum lítlum ári síðani søgdu 70 prosent av veljarunum í Kalifornia, at Arnold Schwarzenegger var ein dugnaligur guvernørur, men í dag eru tað bara 34 prosent, sum siga tað um hann.

Orsøkina siga eygleiðarar vera, at guvernørurin hevur ikki rikið politikk fyrr enn nú. Tá hann varð valdur fyri tveimum árum síðani, lovaði hann at fáa tann kaliforniska búskapin aftur á føtur, men hesi bæði árini hevur hann einki gjørt við tað. Nú noyðist hann at fara til verka, og tað sæst aftur í veljarakanningunum, siga eygleiðararnir. Útlitini eru heldur ikki tey bestu. Tingið í Kalifornia hevur felt fleiri nýskipanir, sum hann hevur lagt fram, og tí hevur hann gjørt av at hava fólkaatkvøðu um tær í november. Men meiningakanningarnar benda á, at veljararnir fara eisini at siga nei.

Arnold Schwarzenegger hevur skotið upp at strika ta regluna í amerikonsku grundlógini, sum sigur, at bara fólk, sum eru fødd í USA, kunnu gerast amerikanskur forseti. Hann hevur ikki dult fyri, at hann kundi hugsað sær at flutt í Hvítu Húsini, men eygleiðarar siga, at tann tankin er rættiliga fjarur í løtuni.

## Tvey ár úti í rúmdini

Eingin maður hevur verið so leingi úti í rúmdini sum russarin Sergei Krikalev, sum í løtuni er leiðari á altjóða rúmdarstøðini ISS.

Higartil hevur hann verið 750 samdøgur í rúmdini, og so leingi hevur eingin annar verið uttan fyri atmosferuna. Tá hann ætlandi kemur aftur á Jørðina tann 7. oktober, hevur hann verið seks mánaðir umborð á ISS í hesum umfari.

Amerikanski læknin og sálarfrøðingurin David Musson sigur við tíðarritið New Scientist, at Sergei Krikalev er ein harður knassi. Russiski rúmdarmaðurin er føddur í 1958, og hann býr í Skt. Pætursborg - tá hann er á Jørðini.

## Sólskipanin gomul

Ein altjóða granskarabólkur vil nú vera við, at okkara sólskipan er tvær milliónir ár eldri, enn vísindin higartil hevur hildið.

Kanningar, sum granskararnir á Geocenter København hava gjørt við at kanna geiðslavirkin evni úr rúmdarsteinum, vísa, at sólskipanin varð til fyri júst 4.569 milliónum árum síðani. Tað merkir, at hon er tvær milliónir ár eldri enn higartil hildið.

Granskarin Henning Hack sigur við tíðarritið Nature, at teir elstu rúmdarsteinarnir eru javngamlir við sólskipanina og stava frá tí elsta lendinum í skipanini. Við at kanna teir ber til at avdúka broytingar í tíðini, og hvussu Jørðin varð til.

- Vit eru nærri einari frágreiðing um, hvussu alt byrjaði, sigur Henning Hack við Nature.